# 19 ára gamal doyði í vanlukkkuni



*Trý fólk vóru í fremra bilinum á myndini – og førarin einsamallur í hinum aftara*
Mynd: Vilmund Jacobsen

**FERÐSLUVANLUKKA** Støðleiðarin á politistøðini í Runavík, Hallgrím Hansen, váttar í morgun, at ein 19 ára gamal drongur úr Skálafirði læt lív í ferðsluvanlukkuni innan fyri bygdina á Skála í gjárkvøldið

Vilmund Jacobsen

Tíðliga í gjákvøldið hendi ein ferðsluvanlukka innan fyri bygdina á Skála, sum kostaði einum ungum manni úr Skálafirði lívið.

Vanlukkan hendi, tá tveir bilar – annar á veg úteftir og hin á veg inneftir – stoyttu frontalt saman.

Støðleiðarin á politistøðini í Runavík, Hallgrím Hansen, sigur, at tað var bilurin, ið koyrdi úteftir landsvegnum, sum av eini ella aðrari orsøk kom út í vinstru síðu á vegnum, tá bilarnir møttust.

Trý fólk vóru í bilinum, sum koyrdi úteftir Skálafjørðinum, meðan førarin var einsamallur í bilinum, sum koyrdi inn eftir, og tað var hesin, sum læt lív í ferðsluvanlukkuni.

Øll fýra, sum gjørdust partur av hesi syndarligu vanlukku, endaðu á Landssjúkrahúsinum, og Hallgrím Hansen, støðleiðari, veit í morgun at siga, at tann eini persónurin nú er útskrivaður, meðan hinir báðir framvegis eru innlagdir.

– Onkur hevur verið undir skurði, men eingin er í lívsvanda, leggur hann aftrat.

## Bilarnir kannaðir

Hallgrím Hansen sigur, at greiða er ikki fingin á, hví vanlukkan hendi.

– Bilarnir verða nú kannaðir hjá Akstovuni, og her verður eitt nú hugt eftir, um onkur orsøk kann vera til, at annar bilurin kom út í skeiva síðu á vegnum. Bremsur, hjól, stýriamboð, upphang og annað verður kannað, sigur støðleiðarin á politistøðini í Runavík.

*vilmund@sosialurin.fo*





**Søkt verður eftir einum bókhaldara til roknskapardeild okkara, sum er mannað av trimum starvsfólkum.**

Starvsøkið umfatar alt bókhald, tó fyrst og fremst kreditorbókhald.

Vit vænta, at tú hevur hollar royndir innan bókhald og Navision. Royndir við Invoice Workflow er ein fyrimunur. Tú skalt vera røkin, sjálvstøðug/ur, jalig/ur og skalt kunna trívast í einum - til tíðir - hektiskum umhvørvi.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og lønin verður ásett eftir royndum og førleikum.

Umsókn við møguligum prógvum skal sendast til Árna Arge, fíggjarstjóra, á teldupostadressu **aa@formula.fo.**

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at ringja til Formula á 344 000 ella senda ein teldupost til áðurnevndu teldupostadressu.

Umsóknarfreistin er:
**Mánadag 27. september 2010.**

formula

©2010 | EXPETUR.COM

Formula | Stiðjagøta 11 | Postboks 1078 | FO-110 Tórshavn | Tel 344 000 | www.formula.fo


## Føðingar



*21. juli bleiv Óðin stóribeiggi. Bjørk er fødd 27.05.09 í Burkina Faso. Foreldur teirra eru Sólbjørg Sivertsen & Jákup Dahl Olesen, Hoyvík.*

29. august fingu Tordis og Eyðstein Lyngvej, Froðba, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3900 gr.

4. september fingu Poula Dulavík Berg og Arnhold Berg, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3844 gr.

14. september fingu Rannvá Káradóttir og Rúnar Reistrup, London, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4060 gr.

14. september fingu Anna og Johan Berg, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

21. september fingu Elsa Maria og Georg Nolsøe Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4320 gr.

12. september fingu Annika Petersen og Karl Aage Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3845 gr.

16. september fingu Lív Haraldsen og Høgni Viderø, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4230 gr.

16. september fingu Mari og Janus í Løðuni, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4300 gr.

16. september fingu Saroya Dalsgarð og Hallur E. Thomsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

18. september fingu Karis Hansen, Hósvík, og Jón Danielsen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3025 gr.

20. september fingu Joan Danielsen og Erik Biskopstø, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2670 gr.

23. september fingu Hanna og Sigurd Højgaard, Norðragøtu, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3200 gr.